













# Frálík hús í Hósvík, við góðum útsýni

Frálíku húsini standa miðskeiðis í bygdini í fríum umhvørvi, við útsyni yvir bygdina, við Selatrað og Reyðafellstindi í baksýni.

**Fyrsta fatanin**
Fyrsta fatanin, tá íð tú koyrir niðan til húsini eftir hugnaliga bygdarvegnum, er at her er talan um eini snøgg hús, har alt er liðugt og væl hildið.

**Húsini**
Húsini eru sera væl hildin og í góðum standi. Meginparturin av miðhæddini er gjørd av nýggjum – niðasta hædd er øll innrættað – møguleiki er fyri at gera køk – og kann hon so nýtast sum sjálvstøðug íbúð.

**Ljós og luft**
Húsini standa frítt og væl fyri, í friðarligum umhvørvi. Har er veðurgott og tú hevur útsýni yvir bygdina og Sundalagið. Og stórsligið er útsýni yvur á Eysturoynna.

**Stílur og snið**
Rúmini eru snøgg, og alt er gjørt úr góðum tilfari. Tær nýtist einki stórvegis at gera, eitt sindur av máling kann gera undurverkir.

**Urtagarður og umhvørvi**
Húsini eru umgyrd av sera vøkrum og vælhildnum urtagarði við grasvølli, alskyns blómum og runnum, so ein fær eina kenslu at verða komin í ein annan aldingarð.

Í urtagarðinum er snotiligur sólkrókur, har tú í friði og náðum kanst njóta løturnar við góðum veðri.

Har er eisini eitt vakstrarhús við alskyns møguleikum.

Næstu grannarnir eru vakra brúsandi áin og sparkivøllurin.

Í nærumhvørvinum er eisini barnaskúli – dagstovnur og handil.

**Fakta**

Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd 202 fermetrar. Grundin er stoypt og ovara hæddin er klødd við timbur og takið er tjørupapp. Í ovaru hæddini eru, gongd, wc, baðirúm, 2 kømur, hjúnarúm, køkur, stova og hjallur. Í niðaru hædd er stórur durur, gongd, kamar, vaskirúm/kjallarúm, fýrrúm/goymslurúm, kamar/stova og baðirúm.
Byggiár: 1979
Grundøkið er 1110 fermetrar til víddar

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni